# Sleppið undan oljuni

Í tvey ár hevur Sp/f Hiti umboðað luft-til-vatn hitapumpur frá svenska Euronum, og talan er um eina vøru, sum føroyingar veruliga hava tikið til sín. Fyrstu tíðina gekk sølan ikki so skjótt, men ferð er spakuliga komin á, og í dag er samlaða sølan komin upp á 125 pumpur. Áki Mortensen, stjóri í Hita, sigur, at fram um flestu av hinum skipanunum, so hevur Euronum sínar fyrimunir. - Serliga tí tær kunnu sameinast við orku frá fleiri øðrum grønum orkukeldum. Eitt nú sólpanelum, vindmyllum og brenniovnum. Og fíggjarliga er hetta eisini nakað, sum loysir seg, tí meðal sparingin í mun til oljufýrdar hitaskipanir er um 60%, sigur Áki Mortensen. Hiti var partur av umhvørvisvikuni í Havn í seinastu viku, og í komandi viku verður fyritøkan við á byggimessuni, sum verður á Hálsi í Havn.






















